REYÐI KROSSUR

Reyði Krossur
Stiðjagøta 6
100 Tórshavn

Tlf. +298 283630
redcross@redcross.fo

V-tal: 423254

Hoyringssvar frá Reyða Krossi Føroya til uppskotið til veðurlagslóg

Reyði Krossur Føroya takkar fyri møguleikan at koma við viðmerkingum til uppskotið til veðurlagslóg, og heldur, at tað er umráðandi, at Føroyar seta sær mál hesum øki. Í okkara egna arbeiði leggur Reyði Krossur dent á at arbeiða burðardygt, og hava vit m.a. fingið hitapumpuskipan, sólpanel og el-bil, samstundis um okkara endurnýtsluvirksemi gevur eitt týðandi íkast til bæði minking av útláti og humanitera hjálp.

Veðurlagsbroytingar eru nemliga ein av størstu avbjóðingunum fyri humaniterum arbeiði. Tær elva til fleiri og størri vanlukkur, flyting av fólki og øktan ótryggleika, og hava tí alsamt størri týdning fyri tað arbeiðið, sum Reyði Krossur ger, bæði kring heimin og her í Føroyum.

Tí fegnast vit um, at lógin í §1, stk. 3 eisini leggur dent á *at betra um møguleikarnar hjá fólki og samfelagnum at laga seg til veðurlagsbroytingar.* Hetta samsvarar væl við arbeiðsháttin hjá Reyða Krossi – at virka fyri at styrkja lokalt mótstøðuføri og tryggleika hjá útsettum borgarum.

Viðmerkingar til lógaruppskotið.

1. **Mangul á bindandi málum:**

   Lógin setur eitt týdningarmikið langtíðarmál um netto null í 2050, og arbeiðshátturin verður lagdur í virkisætlanum, sum verða dagførdar 5. hvørt ár og fevna um 10 ár.

   Vit vilja gera vart við, at tað er umráðandi at gera ítøkilig og bindandi stutttíðarmál, sum tryggja framgongd, og at tað stóra arbeiðið ikki skal gerast í síðstu løtu.

   Í donsku veðurlagslógini eru til dømis ásett greið mál um útlátsminking í 2025 (50–54% í mun til 1990) og í 2030 (70% í mun til 1990). Slík mál áttu at verið í tí føroysku veðurlagslógini, fyri at økja um ambitiónina. Sambært IPCC eigur útlátskurvan at *knekka longu í ár*, og tí er tað týdningarmikið at seta greið stuttíðarmál.

2. **Sivilorganisatiónir og mótstøðuføri:**

   Veðurlagsbroytingar hava avleiðingar, sum røkka langt út um náttúru- og orkuøkið – tær hava stóra ávirkan á lívskor, sálarheilsu og tryggleikan hjá fólki. Tí mæla vit til, at í §4, stk. 2, har landsstýrisfólkið skal ráðføra seg við "týðandi áhugapartar", verða eisini *hjálparfelagsskapir og sivilorganisatiónir* tikin við. Hetta hevði tryggjað, at veðurlagspolitikkurin eisini byggir á vitan um sosialt mótstøðuføri, sálarheilsu og humanitara tilbúgving.

   Tí arbeiðið við veðurlagspolitikki eigur, eins og §1, stk. 3 leggur upp til, at leggja dent á at styrkja samfelagsligt og sosialt mótstøðuføri móti árinum av veðurlagsbroytingum.

   Kring allan heimin virkar Reyði Krossur fyri at styrkja lokalt mótstøðuføri og tryggleika hjá fólki og samfeløgum. Í Føroyum arbeiða vit fyri at betra um møtstøðuføri hjá borgarum, sum eru merkt av einsemi og sosialari útihýsing, tilflytarum og flóttafólkum, fíggjarliga sperdum, og við tilbúgving, ígjøgnum fast virksemi, serlig átøk og undirvísing. Vit mæla til, at slík tiltøk eisini verða tikin við í framtíðar tillagingarátøkum.

   Bæði land og kommunur áttu at sett pening av til tillagingar. Í hesum føri hevði verið gott, um lógin ásetti, at ein veðurlagsgrunnur varð settur á stovn, sum kann stuðla átøkum sambært veðurlagslógini.

Vegna Reyða Kross Føroya,

Jóannes Eidesgaard	**Sigrið Zachariasen**
Formaður	Dagligur leiðari